# Endurtóku norðoyarstevnuna



**5–mannafør gentur: Munurin frá Fípuni Føgru og aftur til hinar bátarnar var á vestanstevnuni størri, enn hann hevur verið síðani á norðoyastevnu**

Fípan Fagra við gentum hevur vunnið FM heitið, og vit ynskja teimum hjartaliga tillukku við tí.

Fípan hevur vunnið allar róðrarnar, meðan havnargentur umborð á Sílinum og argjagentur umborð á Bliki hava kappast um næstfremsta plássið. Tann kappingin er ikki liðug enn. Tað verður ólavsøkuróðurin, sum fer at gera av, um silvur krónurnar skulu enda á Argjum ella í Havnini. Sílið hevur 23 stig, og Blikur hevur vunnið 22 stig.

Á vestanstevnu vóru tær umborð á Bliki tær drúgvaru í kappingini um næstfremsta plássið. Tær vóru um at vera leysar av Sílinum, sum var gott og væl leyst av Tjaldrinum, sum aftur var eina bátslongd frammanfyri Ørnina.

Meistararnir frá 1999, Havfrúgvin, fekk fyrsta stigið á árinum.

## Serflokkurin

Á norðoyarstevnu vann Fípan Fagra sera sannførandi. Tá vóru tær fleiri bátslongdir undan hinum bátunum. Klaksvíksgenturnar vunnu eisini á jóansøku, varmakeldustevnu og á sundalagsstevnuni, men munurin aftur til næstu bátarnar minkaði støðugt, og tað tóktist liggja í luftini, at fyrr ella seinni fór onkur bátur at taka Fípuna Føgru.

Mest uppløgdu evnini at hótta Fípuna Føgru eru høvuðsstaðar bátarnir, Sílið og Blikur, og tað er sjálvsagt møguleiki fyri, at tað fer at eydnast hjá teimum í heimasjógvi á ólavsøku. Men vestanstevnu róðurin gav avgjørt ikki ábendingar um, at tað fer at eydnast. Fípan Fagra vann eins sannførandi, sum tær gjørdu í fyrsta róðrinum í ár. Fípan var einar tvær bátslongdir undan Bliki á mál.

– Vit hava kent okkum pressaðar tær seinastu ferðirnar. Hinir bátarnir eru komnir alt nærri. Í vikuni upp undir vestanstevnuna settu vit í okkum, at nú skuldi tað verða, sum tað var á norðoyarstevnu, og tað eydnaðist. Vit fingu ein fínan start, og tað eyndaðist okkum at vinna eina bátslongd rættuliga skjótt. Hvussu tað gekk fyri seg, tað duga vit ikki rættuliga at greiða frá, men sjálvandi stórfegnast vit um sigurin og um meistaraskapin, siga tær umborð á Fípuni Føgru.

**jh**

# VB í eldin í kvøld

**Um vágbingar í nógva hitanum í Hvítarusslandi megna at skora mál, so verður møguleikin fyri sensatiónini nógv størri**

Vágbingar skulu aftur í kvøld í europeiska eldin. VB er í Hvítarusslandi, har teir skulu spæla seinna dystin í fyrsta innleiðandi umfarinum í europeisku meistarakappingini fyri lið. Mótstøðuliðið er Slavia Mozyr, og í Europa Cup høpi er útgangsstøðan hjá VB ikki so galin. Á Tórsvølli var úrslitið 0–0. Tað vil við øðrum orðum siga, at um VB fer at megna at skora eitt mál, so skulu mótstøðumenninir skora tvær ferðir hjá Bjarna Johansen, um teir skulu sleppa víðari í kappingini.

Eingin ivi er kortini um, at tað er liðið úr Hvítarusslandi, sum er favorittur. Teir skoraðu ikki týdningarmikla útivallarmálið í Føroyum, men teir trýstu nógv. Og hóast teir vóru lítið vandamiklir, og hóast VB verjan stóð seg manniliga, so fer tað at koma óvart á, um teir ikki megna at skora á heimavøllinum. Spurningurin er so, um VB fer at fáa møguleikarnar, sum teir fingu á heimavølli, og um teir fara at megna at fáa størri úrtøku, enn teir fingu fyri viku síðani.

Umstøðurnar hjá VB eru torførari, enn tær vóru fyri viku síðani. Tað er heitt í Hvítarusslandi, og vágbingar eru sjálvandi eitt sindur moyrir, eftir at teir hava ferðast langt og hildið til undir ókendum umstøðum.

VB fór úr Føroyum fyrrapartin sunnudagin. Tey eru 35 í ferðalagnum. 19 spælarar eru við. Ein teirra er venjarin Popczynski, sum ikki hevur havt gott mót um, at tað skal eydnast honum at koma seg so mikið eftir skaðan, sum hevur plágað, at hann verður førur fyri at spæla við í kvøld. Dreymurin er, at venjarin kann seta seg sjálvan á vøllin síðsta hálva tíman, um dysturin framvegis ríður um snarið. Vandin er sjálvandi, at tað skal ganga, sum tað ofta hevur gjørt, tá Europa Cup dystirnir á útivølli hjá føroyskum liðum hava havt stóran týdning. Tað vil siga, at heimaliðið rættuliga skal seta trumf á, tá tað eru teir, sum eru í heimligum umhvørvi.

Umframt tey, sum hava við fótbóltin og liðið at gera, eru fimm nevndarlimir í VB í ferðalagnum. Borgarstjórin í Vági, Jógvan Krosslá, er við í Hvítarusslandi, og tað er stjórin í Suðuroyar Sparikassa, Mikkjal Sørensen, eisini. Sparikassin hevur altíð verið ein stórur stuðul hjá VB.

Í Hvítarusslandi tosa tey russiskt. Tá Slavia Mozyr var í Føroyum í síðstu viku, hevði Ivan Eginsson týdningarmiklan leikut sum tulkur. Ivan er ættaður úr Moskva. Tey seinastu árini hevur hann búð í Føroyum, og hann tosar føroyskt sum ein føroyingur. Tí er tað kærkomið hjá VB, at tað hevur borið til at hava Ivan Eginsson við í ferðalagnum í Hvítarusslandi.

Ferðaleiðari er John Henrik Holm. VB ferðalagið kom til Warszawa seinnapartin sunnudagin. Hagani fóru tey við sovibussi til Mozyr. Teinurin at koyra er 650 kilometrar.

Í Hvítarusslandi búgva umleið 10,5 milliónir. Mozyr er 11. størsti býurin, og har búgva 108 túsund fólk.

VB ferðalagið ætlast at koma aftur til Føroya fríggjadagin.

**jh**

# Esbjerg hevur selt álopstrumf

**Møguleikarnir hjá Christiani Høgna Jacobsen tykjast størri, nú ein tann besti Esbjerg álopsmaðurin varð seldur til Silkeborg**

Í gjár skrivaðu vit, at Christian Høgni Jacobsen og Esbjerg í komandi viku skulu hava sáttmálasamráðingar. Í dag eru fyritreytirnar hjá Christiani Høgna at koma framat í Esbjerg betur, enn tær vóru í gjár.

Mánakvøldið var greitt, at Esbjerg hevur selt ein av álopsspælarunum, sum hevði stóran leiklut, tá Viggo Jensen og hansara menn í Esbjerg síðsta kappingarár vunnu næstbestu deildina.

Talan er um Iddi Alkhag. Hann er 22 ára gamal, hann hevur spælt 97 dystir fyri Esbjerg, og hann hevur skorað 32 mál. At talan ikki er um hvønn álopsspælara sum helst, sæst m. a. aftur í, at nú fyrrverandi Esbjerg álopsmaðurin hevur verið fjúrtan ferðir á danska U–21 landsliðnum.

Tað er Silkeborg, sum hevur keypt álopsspælaran frá Esbjerg. Síðani Henrik Tømrer Petersen fyri stuttum varð seldur til Bolton, hevur Silkeborg leitað við lykt eftir nýggjum álopsspælarum.

Danskir fjølmiðlar halda seg vita, at Esbjerg hevur fingið onkra staðni ímillum tvær og tríggjar milliónir burturúr handlinum.

Hvør av øðrum liva má, plagar at verða tikið til. Sum í so mongum øðrum høpi, so er tað soleiðis í fótbólti, at tað eru tey størru, og tað vil siga tey, sum eiga meiri pengar, sum liva av hinum. Tað er henda søgan eitt gott dømi um. Tað kann væl hugsast, at rokeringarnar fara at hava við sær, at Christian Høgni Jacobsen fer at fáa møguleikan á besta liðnum hjá Esbjerg skjótari, enn tað frammanundan varð roknað við. Um fyrrverandi NSÍ maðurin tekur av, og um tað gongst honum væl, so kann tað verða so skjótt, at hann gerst áhugaverdur hjá onkrum størri felag.

**jh**





# Klaksvíkin fagnaði róðrarfólkunum

**FM sigrar í kapp-róðri: Meiri enn túsund fólk møttu leygarkvøldið upp at fagna róðrarfólkunum í Klaksvík**

Tá Fípan Fagra við gentum, Páll Fangi við kvinnum og Nevið Reyða vunnu á norðoyarstevnu var einki serligt gjørt burturúr. Tað var jú stevna í býnum. Tá somu manningar vunnu á jóansøku var eitt sindur av fólki og tók ímóti, og aftaná hoyrdust fleiri harmast um, at tey ikki høvdu vitað um móttøkuna.

Klaksvíkingar og norðoyingar annars hava verið skjótir at taka við læru. Tað sást væl leygarkvøldið. Tá vóru fleiri enn eitt túsund og tóku ímóti, tá Dúgvan í dýrdarveðri kom á vánna við trimum FM manningum og tveimum manningum, sum tær seinastu ferðirnar hava havt stóra framgongd, og sum vunnu heiðursmerkir á vestanstevnu.

Fýrverkið stóð einki aftanfyri tað á norðoyastevnu, og tað var ikki heilt ólíkt í Tivoli, tá strandferðsluskipið kom floytandi inneftir. Á odda í skrúðgonguni frá ferjuleguni á Varpinum og heim í neystið, sum er á Tingstøðni, gingu kappróðrarfólkini, og tey fingu góða hjálp. Allir tríggir bátarnir vórðu lyftir upp um høvd – stýrimenninir sótu umborð!

Fyrr í tíðini kappaðust bygdir og býir um skip og virki. Nú er tað í fótbólti og kappróðri, at kappingin verður mest ítøkiliggjørd. Í ár er tað kapപróðurin, sum telur hjá okkum, helt ein klaksvíkingur, og tað sást á øllum brøgdum, at hetta var eitt gott høvi at hvessa lokala samleikan.

## 10–mannafarið

Í dýrdarveðrinum uttanfyri róðrarneystið segði næstformaðurin í Klaksvíkar býráð, Torleif Sigurðsson, nøkur orð. Hann ynskti hjartaliga tillukku, og hann duldi ikki, at dreymurin hjá klaksvíkingum er, at teir eisini skulu manna eitt 10–mannafar.

Torleif Sigurðsson er í ítrótti mest kendur fyri at røkja formanssessin í Fótbóltssambandinum. Men á Tingstøðni leygarkvøldið bað hann fólkið goyma hetta loyndarmálið saman við sær. Tað virða vit, og biðja lesararnar ikki siga hetta fyri nøkrum!:

– Eg havi ongantíð luttikið í fótbóltskappingum. Einasti ítróttur, sum eg havi verið aktivur í, er kapp-róður. Eg var við nýggja Klaksvíkinginum í 1970, og vit vunnu tríggjar róðrar – á norðoyarstevnu, á jóansøku og á vestanstevnuni, sum tað árið eisini var í Sørvági. Síðani tá hava klaksvíkingar ongantíð vunnið við 10–mannafarinum. Eg droymi um, at vit aftur skulu vinna í tí kappingini. Um tit halda, at tað er neyðugt við nýggjum báti fyri at røkka tí málinum, so skulu tit bara bíleggja bátin. Eg ivist onga løtu í, at tit fáa nóg nógvar stuðlar, tá gongdin er, sum hon hevur verið í ár, segði Torleif Sigurðsson.

Lógvabrestirnir vóru nógvir, og tað kundi skiljast sum um, at peningaliga skuldi tað ikki standa á.

Vegna róðrarfólkið takkaði Fróði Waag fyri. Hann bæði er nevndarlimur og rør við Nevinum Reyða:

– Um onkur fyri tveimum árum síðani hevði sagt mær, at vit í kvøld skuldu standa her saman við so stórari fjøld og fegnast um trý FM heiti og heiðursmerki til tvær aðrar manningar í vestanstevnuróðrinum, so hevði eg onga orsøk havt at tikið undir við tí. Men nú er tað veruleiki, segði Fróði Waag og takkaði vegna felagið og róðrarfólkið fyri áhugan og undirtøkuna.

## Ymsar umstøður

At borðreiða fyri túsund fólkum er einki soleiðis at tosa um í Føroyum. Hevði tað verið onkra aðra staðni í verðini, so høvdu tey ivaleyst fyrireikað í mánaðir. Í handavend vóru kaffi, køkur og vaflur gandað á borðið. Høvi var at heilsa upp á fólk, og prátið og serliga kappróðrarprátið gekk so lystiliga.

Spell var tað, at myndirnar, sum vórðu tiknar, ikki vóru nóg ljósar, men vit kunnu endurgeva frá kapp-róðrarprátinum.

Onkur hevði verið við at vunnið FM fleiri ferðir í seksti árunum. Tað var við Árnfirðinginum. Tá fegnaðust árnfirðingar og norðoyingar, men tað var einki fýrverk í Árnafirði tá, segði royndi kappróðrarmaðurin fyri teimum, sum nú høvdu staðið seg so væl.

## Róðrarprátið

Tá tað leið eitt sindur frá, og lukkuynskini vóru fingin frá hondini, fóru fryntligu kappróðrarfólkini uttandura at lurta eftir útvarpsupptøkuni, og tá vóru fleiri viðmerkingar.

Í øðrum greinum hava vit sagt frá FM vinnarunum. Ímillum róðrarfólkini var fagnaðurin stórur um, at tað hevði roynst so væl hjá monnunum umborð á Páll Fanga og dreingjunum umborð á Fípuni Føgru.

Fípudreingirnir søgdu seg vera spentar til ólavsøkuna og til komandi kappingarár:

– Kanska høvdu vit staðið okkum uppaftur betur í dag, um vit høvdu havt møguleika at ýta málið av undan róðrinum. Tíverri høvdu vit ikki stundir til tað, og tí fóru vit ov seint undir endaspurtin. Tað var ein taktiskur brølari, hildu Fípudreingirnir.

Páll Fangi við monnum gjørdi leygardagin ein orduligan vørr. Teir endaðu næstfremstir, eftir at teir í hinum róðrunum høvdu verið nummar fimm og eina ferð nummar fýra.

– Ein maður varð skaddur, og so fingu vit ein royndan kappróðrarmann, sum í fjør var við Kjøli, umborð. Eftir tað hava vit skift eitt sindur um upp á fólkið, og vit hava arbeitt við at broyta róðrarlagið. Tað hevur gingið sera væl hesar báðu seinastu vikurnar, og nú eru vit rættuliga spentir til ólavsøkuróðurin, greiddu teir frá, meðan útvarpsmaðurin Helgi Jacobsen var eldhugaður í hátalarunum og rópti seg hásan út yvir vánna, sum lá í silvitni og spegladi sær.

**jh**



*Í síðstu viku nevndu vit, at teir umborð á Nevinum Reyða róðu við Kvívíkinginum á rygginum. Eftir róðurin á vestanstevnu hava vit fingið hesa myndina sendandi úr Klaksvík. Teir vildu vísa okkum og øllum føroyingum, hvussu tað sær út, tá ein orduligur kvívíkingur er á rygginum á einum klaksvíkingi. Klaksvíkingar og kvívíkingar eru kappingarneytar, men kappingin fer fram í góðum lagi*

## Úrslit samanlagt eftir Vestanstevnu

**5-mannafør, dreingir:**

| Nr. | Róðrar | Kort | St. total |
|---|---|---|---|
| 1. Tjaldrið | 5 | | 31 |
| 2. Blikur | 5 | | 24 |
| 3. Sílið | 5 | 1 G | 18 |
| 4. Fípan Fagra | 5 | | 16 |
| 5. Frúgvin | 5 | | 13 |
| 6. Havfrúgvin | 5 | | 8 |
| 7. Drekin | 5 | | 0 |
| 8. Beinta | 5 | | 0 |
| 9. Erla Kongsd. | 4 | | 0 |
| 10. Firvaldur | 3 | | 0 |

**5-mannafør, kvinnur:**

| Nr. | Róðrar | Kort | St. total |
|---|---|---|---|
| 1. Fípan Fagra | 5 | | 35 |
| 2. Sílið | 5 | | 23 |
| 3. Blikur | 5 | | 22 |
| 4. Tjaldrið | 5 | | 12 |
| 5. Ørnin | 5 | | 8 |
| 6. Drekin | 5 | | 2 |
| 7. Hvassi | 5 | | 2 |
| 8. Frúgvin | 5 | | 1 |
| 9. Havfrúgvin | 5 | | 1 |
| 10. Firvaldur | 5 | | 0 |
| 11. Beinta | 5 | | 0 |
| 12. Dúgvan | 5 | | 0 |
| 11. Snípan | 5 | | 0 |
| 12. Báran | 4 | | 0 |

**6-mannafør, kvinnur:**

| Nr. | Róðrar | Kort | St. total |
|---|---|---|---|
| 1. Páll Fangi | 5 | | 35 |
| 2. Jarnbardur | 5 | | 22 |
| 3. Sølmundur | 4 | | 18 |
| 4. Gongurólvur | 5 | | 11 |
| 5. Víkingur | 5 | | 8 |
| 6. Leirvíkingur | 5 | | 8 |
| 7. Hvessingur | 5 | | 3 |
| 8. Fortuna | 5 | | 1 |
| 9. Lómur | 5 | | 0 |
| 10. Snopprikkur | 4 | | 0 |

**6-mannafør, menn:**

| Nr. | Róðrar | Kort | St. total |
|---|---|---|---|
| 1. Strálan | 6 | 1 G | 30 |
| 2. Sølmundur | 5 | | 28 |
| 3. Riddarin | 5 | | 20 |
| 3. Hvessingur | 5 | | 14 |
| 4. Páll Fangi | 5 | | 9 |
| 5. Snopprikkur | 5 | | 4 |
| 6. Gongurólvur | 5 | | 3 |
| 7. Fortuna | 5 | | 2 |
| 8. Fuglfirðingur | 5 | | 0 |
| 9. Kollfirðingur | 5 | | 0 |
| 10. Lómur | 5 | 1 G | 0 |
| 11. Hósvíkingur | 3 | | 0 |
| 12. Víkingur | 3 | | 0 |

**8-mannafør:**

| Nr. | Róðrar | Kort | St. total |
|---|---|---|---|
| 1. Nevið Reyða | 5 | | 33 |
| 2. Kvívíkingur | 5 | 1 G | 24 |
| 3. Knørrur | 5 | | 22 |
| 4. Argjabáturin | 5 | 1 G | 16 |
| 5. Ørvur | 5 | | 7 |
| 6. Heiðabáturin | 3 | | 4 |
| 7. Ormurin Langi | 2 | | 4 |

**10-mannafør:**

| Nr. | Róðrar | Kort | St. total |
|---|---|---|---|
| 1. Havnarbáturin | 5 | 1 G | 35 |
| 2. Vestmenningur | 5 | | 23 |
| 3. Eysturoyingur | 5 | 1 G | 21 |
| 4. Nólsoyingurin | 5 | | 15 |
| 5. Skálabáturin | 5 | 1 G | 11 |
| 6. Suðuroyingur | 4 | | 11 |
| 7. Vágbingur | 1 | | 0 |